HEIMADYSTIRNIR KOMANDI FIMM ÁRINI Á TOFTUM:

Útgrevsturin á Svangaskarði er nú byrjaður

– allar neyðugar avtalur eru komnar uppá pláss, og eru toftamenn tí farnir i holt við at gera grasvøllin á Svangaskarði, sum verður liðugur til EM-heimadystirnar í september

Í gjár varð fyrsti spakin settur í jørðina á Svangaskarði í arbeiðinum at gera grasvøll har, so komandi EM-heimadystirnir kunnu verða spældir **heima**.

Áðrenn sjálv boringin byrjar – tað verður helst í dag – skal svørðurin verða grivin omanav.

Síðani er ætlanin at halda fram gjøgnum veturin, og gongst eftir ætlan, er økjið til vøllin liðugt planerað um mánaðarskiftið februar-marts.

Sáað vøllin í apríl

Í apríl verður so sjálvur vøllurin gjørdur klárur, so hann kann verða sáaður. Frá mai mánaði og fram til september skal so grasið vaksa.

Tað er nevniliga 11. september, at fyrsti heimadysturin skal verða spældur.

Tann fyrsti verður móti Norðurírlandi.

»Vit hava nú fingið øll neyðug loyvi, og trúgva vit eisini, at hetta fer at bera til hjá okkum. Um tað er als eingin ivi,« sigur Niklas Davidsen, formaður í Tofta Ítróttarfelag.

Kostnaðurin verður 8,9 milliónir

Hann sigur, at teir eisini rokna við, at upprunaliga kostnaðarætlanin uppá 8,9 milliónir krónur fer at halda.

Tað grótið, sum nú verður sprongt burtur verður selt Nes Kommuni, sum skal brúka tað á havnarlagnum á Toftum, og kemur inntøkan frá hesum at nøkta sjálvan kostnaðin.

Síðani hevur Tofta Ítróttarfelag fingið tey obligatorisku 30 prosentini frá landsstýrinum. Restin verður fíggjað við lántøku.

Aðrar inntøkur við

Men ikki er óhugsandi, at aðrar inntøkur koma uppí eisini:

»Vit arbeiða í løtuni við ætlanum um onkra sponsoravtalu, og sær út til, at áhugi er fyri hesum,« sigur Niklas við Sosialin. »Men enn er ikki komið á mál við hesum.«

Eftir teimum tekningunum, sum gjørdar eru, kemur nýggi vøllurin at liggja eystur og vestur. Verandi vøllur á Svangaskarði liggur suður og norður.

Hetta kemur eisini at gera sítt til, at sera góð lívd fæst fyri møguligum vindi.

Pláss fyri 7.000 áskoðarum

Samanlagt verður eisini pláss fyri í minsta lagi 7.000 áskoðarum.

Aftrat sjálvum vøllinum verður eisini bygt hús í tveimum hæddum.

Í niðaru hæddini verða umklæðingarrúm og annað tílíkt, meðan høli til FSF, gestir og ymist annað verða í ovaru hæddini.


»Á fundi við FSF í Klaksvík fyri trimum vikum síðani fingu vit játtan fyri, at dystirnir komandi fimm árini skulu verða spældir á Toftum,« sigur Niklas. »So nú vit hava fingið allar tær neyðugu avtalurnar uppá pláss, eru menn her sera spentir uppá at fara til verka.«

Næsta málið: Stadionljós


Í prosjektinum, sum arbeitt verður eftir á Svangaskarði nú, verður miðað eftir at fáa dystirnar spældar í dagsljósi.

»Tað næsta vit fara í holt við, er at fáa útvega ljós til vøllin,« sigur Niklas. »Men so leingi, sum vit ikki hava tey, mugu vit royna at fáa dystirnar lagdar soleiðis, at spælast kann um dagin.«

hj.



Ovara tekningin er flatumynd av ovaru hædd á bygninginum. Har skulu vera høli til FSF, gestir o.a. Niðara tekningin er tilsvarandi flatumynd av niðaru hædd, sum umklæðingarrúm o.a.



Loftstekning av stadionøkinum á Svangaskarði. Vøllurin vinstrumegin er nýggi grasvøllurin, sum nú er farin í gerð. Áskoðaraplass verða allan vegin kring vøllin, umframt bygning til umklæðing, skrivstovu, FSF, gestir o.a.